Teir vunnu F¿royum, og skulu til Danmarkar

"Ungt virki" er eitt tiltak, sum allir FHS næmingar hava møguleika at luttaka í. Tiltaki› sn‡r seg um, at nakrir næmingar hava eitt virki saman, og skulu so framlei›a eina vøru. Sí›ani ver›ur ein vinnari í Føroyum funnin, sum sí›ani skal til Danmarkar at kappast móti ø›rum líknandi "virkum"

Heini í Skorini

"Ungt virki" er ein vallærugrein, sum ein og hvør FHS næmingur hevur møguleika at velja. Teir næmingar sum so velja lærugreinina "ungt virki", skulu vera í einum bólki, sum skal virka sum eitt vanligt virki, og framlei›a eina ella a›ra vøru. Í ár hava f‡ra bólkar kappast, og vinnarin er eisini funnin.

Sjúr›ur Olsen, Kjarstein S. Danielsen, Andrass Thomsen og Agnar Jógvansson standa fyri tí virki›, sum vann hesafer›. Teir hava givi› eitt yrkingasavn út, vi› ikki minni enn 49 yrkingum, og harafturat eru eisini tvær stuttsøgur. Vit hittu teir í einum fríkorteri› úti á Handilsskúlanum í Havn.

Kunnu tit siga eitt sindur um, hvat tiltaki› "ungt virki" er fyri naka›?
"Ungt virki" er ein vællærugrein, sum ein og hvør FHS næmingur kann velja. Ta› eru fleiri vallærugreinar, og "ungt virki" er so ein av teimum. Tríggjar tímar um vikuna ver›ur arbeitt vi› hesi lærugrein. Vit gera eitt virki, har man skal framlei›a eina vøru, og ta› fungerar akkurát sum eitt veruligt virki. Hvørja vøru man velur at framlei›a, er heilt upp til ein sjálvan, og so skal man eisini registrerast hjá "Toll og Skattstovu Føroya". Í prinsippinum er ta› júst ta› sama sum eitt veruligt virki. "Ungt virki" er ikki eitt tiltak, sum føroyingar hava byrja›, men ta› er eitt altjó›a tiltak, sum fleiri lond eru vi› í.

Hvussu leingi hava tit arbeitt vi› hesum virkinum?
Frá seinast í September og til nú tá vit vunnu. Ta› hevur sum sagt veri› í hvussu so er tríggjar tímar um vikuna, at arbeitt hevur veri› vi› hesum, men ofta hava vit siti› aftaná skúlatí›, og onkuntí› eisini heilar dagar. Vit høvdu eisini tvær vikur, har vit bara arbeiddu vi› hesum.

Teir leggja afturat, at ta› hóast alt ikki er so tí›arkrevjandi, sum teir hildu at ta› fór at vera.

Tá vit koma inn á tey fíggjarligu vi›urskiftini, siga teir, at útgávan av bókini kosta›i sera nógv, men at teir ikki hava goldi› naka› úr egnum lumma.

-Vit hava fingi› sponsorar, og teir hava so goldi› ta›, sum gjaldast skal.

Hava tit lært nógv av hesum?
Ja, avgjørt. Vit hava lært nógv um hvussu ta› er at arbei›a í einum bólki. Vit hava b‡tt uppgávurnar ímillum okkum solei›is, at vit hava gjørt ta› sum vit duga best. Teir leggja afturat, at Sjúr›ur Olsen er stjóri í virkinum, Kjarstein S. Danielsen er roknskaparlei›ari, Andrass Thomsen er sølustjóri, og Agnar Jógvansson er skrivari.

Spurdir, um ta› ikki hev›i veri› nógv lættari bara at havt vanligari skúlagongd, siga teir, at ta› halda teir ikki. Teir eru allir á einum máli um, at hetta hevur veri› nógv stuttligari enn vanlig skúlagongd.

Tit hava givi› eitt yrkingasavn út. Hví valdu tit júst hesa vøruna?
Ja, vit funnu bara uppá ta›. Eg haldi at ta› kom burtur úr ongum. Teir leggja flennandi afturat, at onkuntí› hevur veri› ósemja og samrá›ingarslit, sum teir kalla ta›. men hóast alt hevur ta› ongantí› veri› so álvarsamt.

-Vit eru f‡ra persónar vi› f‡ra ymiskum ásko›anum, og onkuntí› hava vit eisini provokera hvønn annan eitt sindur, siga teir flennandi.
Teir hava kappast vi› f‡ra a›rar ymiskar bólkar, og tey hava eisini framleitt ymiskt. Ein bólkur gjørdi eitt telduskei›, nøkur gjørdu upptrekkjarar o.s.fr.

Kunnu tit n‡ta hetta til naka› í framtí›ini?
Vit fáa prógv uppá at vit hava vunni›, tí hetta er altjó›a gó›kent. Um vit søkja ví›ari at fáa lærupláss ella arbei›i, so kunnu vit leggja hetta fram sum prógv uppá, at vit hava roynt at veri› í einum virki. So ta›, at vit hava roynt hetta, skuldi givi› okkum betri møguleikar í framtí›ini.

27. apríl skulu teir so eisini ni›ur til Danmarkar, har teir skulu kappast vi› onnur virkir, sum eisini hava framleitt ymiskar vørur, og fer›in fer at vara í f‡ra dagar. Har skulu teir kappast ímóti uml. 180 ø›rum virkum, og teir siga, at í fjør kom virki› úr Føroyum, sum framleiddi eina barnafløgu, á eitt flott tri›ja pláss. So teir hava naka› at liva upp til, og eru eisini sera bjartskygdir.

Teir mæla eisini heilt víst ø›rum til, sum ætla sær út á FHS, at velja lærugreinina "ungt virki", tí ta› er sera spennandi og læruríkt.
Teir hava sum sagt givi› út eina bók vi› 49 yrkingum og tveimum stuttsøgum, og 15 yrkjarar hava yrkt til yrkingasavni›.

Hvør hevur so yrkt?
Vit settu eina l‡sing í blø›ini og bó›u fólk yrkja, og sí›ani at senda yrkingina til okkum. Í byrjanini kom einki, sum vit eisini væntа›u. Men so kom heilt óvænta yrkingar í hópatali› til okkum. Ikki minni enn 200 yrkingar komu, so vit noyddust at velja og vraka› sum best bar til. Teir leggja afturat, at teir fóru ikki at leita eftir profesionellari hjálp, fyri at vita hvør yrking skuldi í, og hvat skuldi vrakast, men ta› gjørdu teir sjálvir.

Spurdir, um teir hava naka› skil fyri, hvat ein gó› yrking er, siga teir, at teir pilka›u burturúr eftir "smag og behag".

-Men vit hava roynt at tiki› so ymisk evnir sum tilber í yrkingasavninum, so ta› ver›ur ein breidd í okkara yrkingasavni›.

Yrkingasavni› hjá teimum eitur "Tavar". Tá eg so spyrji teir, hví ta› eitur "Tavar", er svari›, at sagnor›i› at tava merkir at strí›ast ella at bróta ígjøgnum, og ta› meta teir at teir hava gjørt, leggja teir flennandi afturat.

Tá vit so koma inn á framtí›ina hjá hesum virki, siga teir, at teir hava eina ætlan um at halda á, hóast skúlin krevur, at virki› skal avtakast.

So eitt n‡tt yrkingasavn kemur út skjótt?
Kanska, kanska ikki, siga teir smílandi.

Teir hava eisini eina heimasí›u inni á internetinum, sum er www.clik.to/tavar, og har er so møguleiki at ogna sær bókina ella yrkingasavni› sum kostar 90 kr. Teir hava gjørt 300 eintøk, og longu selt umlei› helvtina. Peningin b‡ta teir ímillum sín.

Vit onnur bí›a spent eftir næsta yrkingasavni› teirra (haha), og ynskja teimum gó›a eydnu í Danmark. Vit vóna, at teir fáa eitt gott og hei›urligt úrslit.